BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

8. november 2023
Mál: 23/18680-15

Svar til Mentanarnevnd Løgtingsins um átøk í trípartaavtaluni frá 2019

Vísandi til skriv frá Mentanarnevnd Løgtingsins, LM-027/2023 hm/ód, í sambandi við viðgerð av "løgtingsmáli nr. 27/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yrkisútbúgvingar" verður landsstýrismaðurin biðin um at upplýsa fyri nevndini, hvørji átøk í trípartaavtaluni frá 2019 ávikavist eru sett í verk og nær og ikki sett í verk.

Svar
Yvirskipað kann sigast, at trípartasemjan verður nevnd í samgonguskjalinum frá 22. desember 2022, har sagt verður, at "Yrkisútbúgvingar skulu raðfestast frammarlaga við fleiri yrkisútbúgvingum, við vaksnamannaútbúgving og við m.a. átøkum frá trípartasemjuni í 2019." Einki verður sagt um júst hvørji átøk skulu raðfestast, og tí er neyðugt at viðgera júst hvørji av átøkunum skulu raðfestast. Talan er um 12 átøk.

Niðanfyri verður greitt stutt frá hvørjum parti sær við yvirskrift og høvuðspunktum úr trípartasemjuni, og tilskilað verður í hvønn mun átakið er sett í verk.

1) **Nýggj lærlingaskipan**

- Eitt støðishálvár skuldi gerast til teirra, sum ikki hava lærusáttmála, har tey ungu hava møguleika at royna trý yrki, áðrenn tey velja yrkisleið. Hetta er ikki sett í verk**.**
- Longdin av skúlaskeiðum eftir Yrkisnámi 1 skuldi tillagast einstøku yrkjunum. Hetta skuldu vinna og skúli gera í felag. Hetta verður íverksett í 2024 fyri nakrar av útbúgvingunum. Í fyrstu atløgu fyri yrkisútbúgvingarnar til maskinsmið, rør- og blikksmið og finstálsmið, har 2. skúlaskeið (20 vikur) verður til tvey skúlaskeið upp á 10 vikur hvørt. Nýggj og endurskoðað útbúgvingarkunngerð fyri hesar útbúgvingar var lýst í september 2022, og longdin á skúlaskeiðum ásett í námsskipanum fyri útbúgvingarnar. Ætlanin er, at longdin á skúlaskeiðum eisini skal tillagast fyri fleiri av hinum yrkisútbúgvingunum.
- Yrkini skuldu fáa egna námsætlan, sum allar skuldu gerast av nýggjum og lagast til einstøku yrkini. Hetta er lutvíst sett í verk. Talan er tó um tillagingar av verandi námsskipanum. Eitt dømi er omanfyri nevndu útbúgvingar, maskinsmiður og rør og blikksmiður, har endurskoðaðar námsskipanir vóru útgivnar í august 2022.
- Farast skuldi frá F og E stigi upp á D stig í almennu lærugreinunum við møguleika at velja C stig. Og almennu lærugreinarnar skuldu yrkisrættast. Hetta er bert í sera avmarkaðan mun sett í verk. Yrkisútbúgvingarnar hava enn í flestu førum E stig. Tó eru onkur undantøk. Útbúgvingin innan aling á landi og sjógvi (frá 2022) hevur nakrar almennar lærugreinar á C-stigi. Og tey, ið taka FHS sum part av handils og skrivstovuútbúgving, taka C stig. FHS er tó eldri enn trípartasemjan. Námsætlanirnar til almennu lærugreinarnar taka í ávísan mun nú

størri hædd fyri tí yrkisfakliga, eitt dømi er nýggja námsætlanin til føroyskt frá august 2023. Tað er tó ikki víst, at hetta fult út møtir ynskjunum frá trípartasemjuni um yrkisrættaðar almennar lærugreinar.
- Upptøka til yrkisnám skuldi vera tvær ferðir árliga í tann mun næmingagrundarlagið lýkur treytirnar til minstamark á flokkum. Kunngerðarheimild fyri at gera hetta var fingin til vegar í 2019 í kunngerðini um felagsreglur fyri yrkisnám. Hetta er tó treytað av floksstødd.

2) Næmingar uttan lærusáttmála og við avbjóðingum

Ein arbeiðsbólkur skuldi setast at eyðmerkja, hvørji tey eru, ið fella uttanfyri verandi útbúgvingartilboð, og skuldi koma við uppskotum um tilboð til henda bólk í desember 2019. Hetta er ikki sett í verk.

3) EUX

EUX, ein sonevnd yrkisgymnasial útbúgving, ið samansjóðar yrkis- og gymnasiala partin, soleiðis, at tú fært sveinabræv, samstundis sum tú fært betri møguleika fyri víðari útbúgving, skuldi bjóðast út á vári 2020. Arbeitt verður nú við at nágreina tørvin og møguleikarnar. Landsstýrismaðurin setti ein arbeiðsbólk á vári 2023. Arbeiðssetningurin fevnir tó nú eisini um útbúgvingarnar á Heilsuskúla Føroya, og aðalmálið er atgongd til víðari lestur fyri nakrar av útbúgvingunum, sum í dag ikki geva beinleiðis atgongd til víðari lestur. Um úrslitið av hesum arbeiði verður ein EUX, sum trípartasemjan leggur upp til, og sum vit kenna tað úr Danmark, er tó ikki víst. Her hevur tað týdning at vísa á, at talan eins væl kann gerast um ískoytisútbúgving til yrkisútbúgvingarnar, ið røkkur nakað av tí sama endamálinum, sum ein EUX vildi rokkið – betri møguleikum fyri víðari útbúgving. Talan kann eisini gerast um okkurt, ið samantvinnar hesar møguleikar.

4) Merkantilu útbúgvingarnar endurskoðaðar og tillagaðar tørvinum á arbeiðsmarknaðinum

Yrkisdepilin hevur, saman við arbeiðsmarknaðarpørtunum, yvir longri tíð arbeitt við hesum. Og eru tilmæli fyri stuttum send Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Støða skal takast til hesi tilmæli.

5) Fleiri læru- og praktikkpláss innan tað almenna

Greinast skuldi, hvørji økir tað almenna kann útbúgva lærlingar og síðani skuldi eitt lærlingatal setast á hvørt økið; eitt nú hvussu nógvir lærlingar skulu útbúgvast sum føðsluatstøðingar, føðsluhjálparar, kt-supportarar, skrivstovufólk o.s.fv. Henda greiningin er ikki gjørd.

6) Viðlíkahald av landsins ognum sum liður í at fáa eitt støðugari lærlingatal

Talan er her um eitt átak, ið skal setast í verk tá lákonjukturur rakar búskapin fyri at halda virkseminum í vinnuni uppi. Víst verður á, at samlaðu íløgurnar hjá tí almenna og tilgongdin av lærlingum fylgjast rættuliga neyvt.

7) Heimildarlóg um konjukturjavnandi uppraðfesting av landsvegahaldi og umvæling av landsins bygningum

Lógaruppskot fyriliggur frá 2019, sum kann berast í Løgtingið, tá búskaparligu umstøðurnar tala fyri tí.

8) Útbjóðing av almennum arbeiðum setur krøv til fyritøkur um at útbúgva til vinnuna

Treytir skuldu setast um, at fyritøkur sum bjóða upp á arbeiði sum stjórnarráð og stovnar undir landinum bjóða út, skuldu hava átikið sær at útbúgva yrkislærd. Her er viðkomandi at vísa á, at vit seinastu árini hava havt met nógvar lærlingar, og at til ber at taka hetta málið upp aftur, um so er, at lærlingatalið fellur týðandi.

9) Lønarendurgjaldið til meistarar ísv. skúlagongd hjá lærlingum gerast konjukturtengt

Lógaruppskot er lagt fyri Løgtingið og er til viðgerðar í Mentanarnevnd Løgtingsins.

10) Arbeiðsgevarar stovna lærlingaráð

Hetta er sett í verk sambært Vinnuhúsinum.

11) Felags kunning, vegleiðing og marknaðarføring av yrkisútbúgvingunum

Kunningarplatformur skuldi setast í verk og arbeiðsgevarar, løntakarar hava veitt sín part av fíggingini, men Yrkisdepilin hevur ikki havt oyramerkta fígging til ætlaða platformin. Tó er viðkomandi at vísa á, at kunningin um yrkisútbúgvingarnar er batnað munandi. Her verður serligað hugsað um heimasíðuna hjá yrkisdeplinum, www.yrkisdepilin.fo, ið hevur góða og væl skipaða kunning um yrkisútbúgvingarnar. Harumframt hevur verið skipað fyri viðkomandi kunningartiltøkum. Tiltakið "Vinnan vitjar" á Glasi, er eitt dømi um tílíkt kunningartiltak, har kunning um útbúgvingarmøguleikar eisini eru partur.

12) Forum fyri støðugari lærlingatali

Hetta er ikki sett í verk.

Vinarliga

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen
aðalstjóri